# P/F Tryggingarfelagið Lív

Skrás.nr. 5367

## Ársfrásøgn fyri 2011

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið ........ | 2 |
| Leiðslufrágreiðing ........ | 3-6 |
| Leiðsluátekning ........ | 7 |
| Átekning frá óheftum grannskoðarum ........ | 8-9 |
| Nýttur roknskaparháttur ........ | 10-12 |
| Rakstrarroknskapur ........ | 13 |
| Fíggjarstøða ........ | 14-15 |
| Frágreiðing um eginogn ........ | 16 |
| Notur ........ | 17-25 |
| Seinastu 5 árini ........ | 26 |

# Upplýsingar um felagið

**FELAGIÐ**

P/F Tryggingarfelagið Lív
Kopargøta 1,
Postsmoga 206
FO-100 Tórshavn
Skrásetingarnr. 5367
Heimstaður: Tórshavn kommuna
3. roknskaparár

**NEVND**

Finn Danberg, nevndarformaður
Gunnleyg Árnafjall, næstformaður
Kári Petersen
Jógvan Mørkøre
Gunnleivur Dalsgarð

**STJÓRN**

Poul Christoffur Thomassen, stjóri

**AKTUARUR**

Jan Buschardt, cand. act., góðkendur aktuarur

**TRYGGINGARLÆKNI**

Høgni Debes Joensen, landslækni

**GRANNSKOÐAN**

NOTA, løggilt grannskoðanarvirki P/F
Sp/F Grannskoðaravirkið *INPACT*, løggilt grannskoðaravirki

**HØVUÐSVIRKSEMI**

Tryggingarfelagið Lív er eitt lívstryggingarfelag, sum selur lívstryggingar og eftirlønarskipanir á føroyska marknaðinum. Felagið umsitur tær tryggingar hjá LÍV-samtakinum, sum eru teknaðar síðan 1/1-2000.

Árið 2011 hevur verið merkt av stóru rembingunum á fíggjarmarknaðinum, men úrslitið var tó nøktandi. Ársúrslitið var 9,9 mió. kr. áðrenn skatt og 8,1 mió. kr. eftir skatt. Felagið hevði eitt avlop, áðrenn flyting til kollektivt bonus og til kundaogn, uppá 23,6 mió. kr. Úrslitið er býtt soleiðis, at 9,9 mió. kr. eru fluttar til eginogn, 5,0 mió. kr. eru fluttar til kollektivt bonus, og 8,7 mió. kr. eru fluttar til kundaogn. Kundaognin er rentað við 13,7% í árinum. Tryggingartakararnir hava fingið tilskrivað eina konturentu uppá 2,5%.

**ÁRIÐ 2011 – GONGDIN Í VIRKSEMI OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM**

**Tryggingarvirksemi**

Tryggingargjøldini vóru í árinum góðar 267,5 mió. kr. Hetta er ein vøkstur uppá 22,7 mió. kr., svarandi til 9,3%. Vøksturin stavar serliga frá einum vøkstri í samlagstryggingunum á 20,2 mio. kr. Við ársenda vóru 13.940 persónar fevndir av eftirlønar- og lívstryggingum móti 13.443 við ársbyrjan.

Harumframt vóru 15.120 persónar fevndir av samlagstryggingum hjá Tryggingarfelagnum Lív móti 15.042 við ársbyrjan.

Tryggingarveitingarnar kunnu býtast millum útgjaldingar í sambandi við eftirlønaraldur, útgjøld í sambandi við deyða og óarbeiðsføri, umframt afturkeyp av tryggingum. Váðin við deyða og óarbeiðsføri verður endurtryggjaður. Tryggingar-veitingarnar í árinum vóru 86,1 mió. kr. í mun til 96,2 mió. kr. árið frammanundan. Størsta broytingin er orsakað av afturkeypum í árinum.

Gongdin hjá samlagstryggingini var eisini góð, og bonus til samlagstrygging vaks við 5 mió. kr. Lívstryggingaravsetingarnar verða gjørdar upp til marknaðarvirðið við støði í einari rentukurvu, sum er ásett av fíggjareftirlitinum.

Í oktober var uppgerðarhátturin fyri rentukurvina broyttur, og hetta merkir, at lívstryggingar-avsetingarnar minkaðu. Men uttan mun til hetta fullu uppgerðarrenturnar nógv í 2011, og avleiðingarnar vórðu, at lívstryggingaravsetingar vuksu munandi. Broytingin í lívstryggingaravsetingum øktist í árinum frá 138,2 mió. kr. til 244,0 mió. kr. Høvuðsorsøkin til broytingina er rentugongdin í árinum.

**Fíggjarvirksemi**

Avkastið er merkt av, at kursirnar á partabrøvunum fullu nógv í summar. Íløguavkastið áðrenn rentuavdekning í 2011 var 3,2%. Felagið tryggjar rentuváðan, og í árinum hevði hetta eina positiva ávirkan á íløguavkastið við 7,8%. Samlaða íløguavkastið eftir fyrisitingarkostnað var 10,2%.

Meginparturin av íløgum felagsins verða gjørdar í lánsbrøv, og í 2011 hevur felagið selt øll síni børsskrásettu partabrøv. 86% av íløgunum við ársenda í 2011 vóru í lánsbrøvum, meðan restin er spjadd millum íløgufeløg, innlán og útlán v.m.

Íløgupolitikkur felagsins er at spjaða íløgurnar, soleiðis at felagið ikki verður so hart rakt, um ein íløguflokkur ikki gevur nøktandi avkast. Harumframt er íløgupolitikkurin merktur av broytingunum í solvensreglunum, sum hevur ført við sær, at felagið hevur valt at økja um partin av lánsbrøvum.




Í 2011 var rentan fallandi, og hevði tað við sær kursvinning á lánsbrøvum. Felagið hevði ein vinning av lánsbrøvum á 8,2%. Partabrævakursirnir fullu nógv í 2011 og felagið staðfesti eitt tap uppá 29,9%.

Avkastið av íløguognunum er lýst í talvuni niðanfyri.

| | Miðal íløga Primo/ultimo | Avkast t.DKK | Avkast % |
|---|---|---|---|
| Kapitalpartar í ass. fel. | 4.989 | 22 | 0,4% |
| Kapitalpartar | 111.008 | -33.229 | -29,9% |
| Lánsbrøv | 865.668 | 71.026 | 8,2% |
| Íløgufeløg | 119.290 | -545 | -0,5% |
| Útlán | 16.941 | 694 | 4,1% |
| Innlán | 30.956 | 134 | 0,4% |
| Úrslit áðrenn avdekning | 1.148.852 | 38.102 | 3,2% |
| Rentuavdekningur | 26.559 | 84.634 | |
| | 1.175.411 | 122.735 | 10,4% |
| Fyrisitingarkostnaður | | -2.649 | -0,2% |
| Tilsamans | 1.175.411 | 120.086 | 10,2% |

**Kapitalstyrki**

Grundarfæfeingi felagsins øktist í árinum frá 121,4 mió. kr. til 135,0 mió. kr. Eginognin er økt frá 58,1 mió. kr. til 66,2 mió. kr. Kundaognin øktist við 5,5 mió. kr., og kollektivt bonus øktist við uml. 5 mió. kr.

Í 2011 hevur felagið arbeitt við at dagføra fæfeingisreglurnar til nýggju EU reglurnar. Nú verður fæfeingiskravið gjørt í samsvar við tær komandi sonevndu solvency II reglurnar. Hetta merkir, at fæfeingiskravið er økt munandi. Fæfeingiskravið var ultimo 2011 173,4 mió. kr., og grundarfæfeingi var 135,0 mió. kr., og felagið manglaði 38,4 mió. kr. í til at grundarfæfeingi var á stødd við fæfeingiskravið.

Kapitalstyrki felagsins er lýst í talvuni niðanfyri.

| t.DKK | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Eginogn | 66.175 | 58.068 |
| Kundaogn | 68.837 | 63.330 |
| Grundarfæfeingi | 135.012 | 121.398 |
| Fæfeingiskrav | 173.400 | 48.094 |
| Grundarfæfeingi til avlops | -38.388 | 73.303 |
| Kollektivt bonuspotentiali | 73.500 | 68.418 |
| Kapitalstyrki | 35.112 | 141.721 |

Vegna fæfeingisstøðuna við ársenda 2011 hevur felagið í samskifti við eftirlitismyndugleikarnar gjørt endurreisingarætlanir og framskrivingar v.m., soleiðis sum lóggávan ásetir. Sum umrøtt undir "Hendingar eftir roknskaparlok" niðanfyri, er felagið í 2012 farið undir at umleggja tryggingar til marknaðarrentu, og kemur hetta væntandi at virka við til, at felagið fyrsta ársfjórðing 2012 hevur eitt grundarfæfeingi, sum nøktar fæfeingiskravið.

**Býti av úrsliti**

Úrslitið fyri 2011 kann útgreinast soleiðis:

| | t.DKK | % |
|---|---|---|
| Úrslit áðrenn býti | 23.644 | 100% |
| Býtt til: | | |
| Kollektivt bonuspotentiali | 5.082 | 21% |
| Kundaogn | 8.676 | 37% |
| Eginogn | 9.886 | 42% |
| | 23.644 | 100% |

Fyri skatt var úrslitið 9,9 mió. kr. Eftir skatt var úrslitið 8,1 mió. kr.

**VÁÐASTÝRING**

Felagið er ávirkað av fleiri váðum. Hesir váðar eru í høvuðsheitum fíggjarligir, tryggingarligir, operationellir og handilsligir. Nevndin ger karmar fyri stýring av váðunum í samtakinum, meðan leiðslan hevur ábyrgdina av, at karmarnir verða hildnir.

Felagið hevur sett í verk eina skipan, har allir týðandi váðar verða eyðmerktir, og kapitalkrav verður gjørt upp til at standa ímóti hesum váðum. Um stórar broytingar eru í mun til seinastu uppgerð, skal støða takast til, um meira kapitalur skal setast av til hesar váðar.

**Fíggjarligir váðar**

Marknaðarváðin er váðin fyri, at virðið á aktivunum ella skyldunum hjá felagnum broytist vegna rentu- og kursbroyting v.m. Gjaldførisváðin er vandin fyri tapi, ið stendst av tørvinum fyri gjaldføri innan stutta tíðarfreist fyri at halda gjaldskyldur felagsins. Mótpartsváðin er váðin fyri tapi orsakað av, at mótpartar ikki halda sínar skyldur. Vantandi spjaðing kann hava tap við sær, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr.

Fyri Tryggingarfelagið Lív er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin, og tann váðin, har størsti parturin av fæfeingiskravinum stendst av. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv saman við avdekningi av rentuváða. Somuleiðis eru íløgurnar í partabrøv varisligar.

Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti. Felagið ger m.a. hvønn ársfjórðing stresstestir av váðanum, harundir tær sonevndu "trafikkljóstestirnar", og felagið ger kvartárliga upp fæfeingiskravið, har ognir og skyldur verða váðamettar.

Rentuváðin er tann størsti váðin fyri felagið. Tá Lívstryggingaravsetingarnar verða gjørdar upp til eina marknaðarrentu, er ein munandi rentuváði. Hesin verður avmarkaður við at keypa rentuavdekningar. Hetta er fyri at tryggja, at ognirnar vaksa eins nógv, sum avsetingarnar, um renturnar fella. Felagið arbeiðir saman við uttanhýsis serfrøðingur, at tryggja at rentuváðin ikki gerst ov stórur.

Gjaldførisváðin verður avmarkaður við, at munandi partar av íløgunum eru í søluligum skrásettum virðisbrøvum. Mótpartsváðin verður avmarkaður við, at ein stórur partur av íløguognunum er settur í stats- og realkredittlánsbrøv. Spjaðingarváðin avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur við sama útgevara.

**Tryggingarligir váðar**

Tryggingarligu váðarnir viðvíkja gongdini í deyðstíttleika, avlamnistíttleika, hættisligari sjúku v.m. Eitt nú økir hækkandi livialdur veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið á andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í samband við deyða og sjúku. Av hesum er mest týðandi váðin livialdur.

Spjaðingarváði í sambandi við tryggingarligar váðar fevnir um vandan fyri tapi vegna ov stórar einstakar kundabólkar og einstakar tryggingar.

Felagið hevur avmarkað tryggingarligu váðarnar við at spjaða tryggingarmongdina millum nógvar ymiskar kundabólkar, fakfeløg o.fl. og við endurtrygging.

**Operationellir váðar**

Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligar ósemjur, ikki nøktandi ella skeivar mannagongdir ella svik. Felagið avmarkar operationellan váða við funktiónsskilnaði og innaneftirliti, sum støðugt verður endurskoðað og dagført.

Kvartárliga verða allir operationellir váðar gjøgnumgingnir, og øll tap verða skrásett og fráboða til leiðsluna.

**Handilsligir váðar**

Handilsligir váðar fevna um strategiskar váðar, váðar fyri umdømi og aðrar váðar við tilknýti til uttanhýsis ávirkanir. Felagið fylgir neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustig eru á kappingarførum stigi. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við viðskiftafólk.

**Fíggjarlig ávirkan av váðum**

Í notu 23 er ein lýsing av, hvussu felagið fíggjarliga kann verða rakt av nøkrum ávísum váðum, sum verða mettir at vera viðkomandi fyri felagið.

**VITANARSTIG**

Felagið leggur stóran dent á, at vitanin hjá starvsfólkum felagsins er á høgum fakligum stigi, soleiðis at viðskiftafólk fáa holla ráðgeving. Starvsfólkini hava í stóran mun tryggingarliga ella fíggjarliga útbúgving. Starvsfólkini fáa støðugt hóskandi eftirútbúgving á sínum virkisøki.

**MENNING**

Felagið arbeiðir framhaldandi við at menna útboðið til viðskiftafólkini. Í næstum verður møguligt at tekna tryggingar til marknaðarrentu. Slík menning er nær knýtt at KT-skipanum, sum felagið støðugt mennir í samstarvi við uttanhýsis veitarar.

**ETISK FYRILIT**

Íløguvirksemið felagsins verður skipað soleiðis, at málið um hægst møguligt avkast verður rokkið, samstundis sum fyrilit verður havt fyri, at íløgurnar eru etiskt og sosialt ráðiligar.

Tann størsti parturin av íløgum felagsins verður umsitin av íløgurøktarum uttan fyri felagið. Í avtalum við íløgurøktararnar verður skrivað, at dentur áhaldandi skal leggjast á at halda grundleggjandi mannarættindi. Høvuðsmálið er, at ILO-sáttmálin verður hildin, um ikki at misnýta barnaarbeiði, ikki at gera nýtslu av tvingsilsarbeiði, ikki at gera mismun millum kyn á arbeiðsplássum og at virða felagafrælsið.

Á heimasíðu felagsins (www.liv.fo) er listi til skjals, sum vísir, hvørjum feløgum Tryggingarfelagið Lív við seinasta árslok hevði íløgur í.

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**

23. desember 2011 samtykti Løgtingi broytingar til skatting av pensjónum. Hetta hevur við sær, at pensjónir, ið arbeiðsgevari rindar, verða skattaðar við 40 %, og bert 60% verða inngoldin til felagið. Hetta merkir, at inngjøldini fyri hesar tryggingar falla við 40%, eins og fæfeingiskravið fellur av hesi orsøk. Samlagstryggingar verða ikki merktar av lógarbroytingini.

Felagið hevur í samráð við fakfeløgini, ið umboða meginpartin av tryggingartakarunum, valt at leggja um frá miðalrentu til marknaðarrentu. Marknaðarrentu-skipanin gevur felagnum betri møguleikar fyri at hava eina íløgustrategi, ið betri sampakkar við tær skyldur, felagið hevur mótvegis kundunum. Miðalrentuskipanin setur munandi størri krøv til fæfeingi, og hetta avmarkar hóskandi íløgumøguleikar.

Umleggingin til marknaðarrentu viðførir, at felagið væntandi kemur at hava eitt grundarfæfeingið, ið er størri enn fæfeingiskravið, og verður hetta væntandi 1. ársfjórðing 2012.

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki annað hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**ÚTLIT FYRI 2012**

**Tryggingarvirksemi**

Tryggingarmarknaðurin fyri 2012 verður væntandi merktur av, at nýggj skipan fyri skatting av pensjónum er sett í gildi 1. januar 2012. Tryggingargjøldini koma væntandi at falla í 2012.

Tryggingarveitingarnar koma væntandi at vera á sama støði sum í 2011.

Arbeitt verður alsamt við at minka um umsitingarkostnaðir.

**Fíggjarvirksemi**

Fyri 2011 varð roknað við einum rímiligum avkasti av partabrøvum, men hetta helt ikki, og felagið staðfesti stór tap, og hevur selt øll síni børsskrásettu partabrøv.

Viðvíkjandi lánsbrøvum varð fyri 2011 roknað við einum fallandi avkastið, men vegna fallandi rentur hækkaðu kursirnir, og felagið staðfesti eitt gott avkast.

Ábendingar eru um, at rentan á lánsbrøvum fer at hækka í 2012, og tí kann roknast við, at avkastið av lánsbrøvum í 2012 verður minni enn í 2011.

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri felagið fyri 2011. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi og tryggjar, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 27. apríl 2012

**Stjórn**

Poul Christoffur Thomassen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Finn Danberg<br>nevndarformaður | Gunnleyg Árnafjall<br>næstformaður | Kári Petersen |
| Jógvan Mørkøre | Gunnleivur Dalsgarð | |

**Til partaeigararnar í P/F Tryggingarfelagnum Lív**

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá P/F Tryggingarfelagnum Lív fyri roknskaparárið 01.01.2011 til 31.12.2011, við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársfrásøgnin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og harumframt eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu pr. 31.12.11 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 01.01.2011 til 31.12.2011 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

# Átekning frá óheftum grannskoðarum

**Ískoytisupplýsingar viðvíkjandi viðurskiftum í ársfrásøgnini**

Uttan at hetta ávirkar okkara niðurstøðu skulu vit vísa til leiðslufrágreiðingina brotini "Kapitalstyrki" og "Hendingar eftir roknskaparlok" á síðunum 4 og 6, har tað framgongur, at pr. roknskapardagin vanta 38,4 mió. kr. í at uppfylla fæfeingiskravi. Leiðslan hevur í nevndu brotum greitt frá, hvørji tiltøk eru sett í verk í hesum sambandi, harundir at avtalur eru gjørdar við tryggingartakarar um at broyta tryggingaravtalurnar frá miðal- til marknaðarrentu. Leiðslan væntar, at tiltøkini gera, at felagið aftur kemur undir krøvini til fæfeingi í tryggingarlógini.

Tórshavn, tann 27. apríl 2012

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Hans Laksá
løggildur grannskoðari

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT,
Løggilt grannskoðaravirki

Heini Thomsen
løggildur grannskoðari

**ALMENT**

Ársfrásøgnin er gjørd sambært viðtøkum felagsins og í samsvar við ásetingarnar í tryggingarlógini og í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir frá Tryggingareftirlitinum. Við nýggju tryggingarlógini frá 2008 vórðu hugtøkini "innrokning" og "máting" tikin í nýtslu. "Innrokning" merkir at taka við í roknskapin og "máting", hvussu virðisásett verður.

**Alment um innrokning og máting í ársfrásøgn felagsins**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar so hvørt, sum tær verða forvunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar, broytingar í avsetingum og broytingar í bonus – so hvørt hesar verða staðfestar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virði á ognini verður mett álítandi. Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá hesar eru sannlíkar og kunnu mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður fyrilit tikið fyri væntaðum tapi og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Avrunding av upphæddum**

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan**

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Transaktiónir í útlendskum gjaldoyra verða støðugt umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðir til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**RAKSTRARÚRSLIT 2011**

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2011 eftir hini sonevndu kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í tí.

Felagið hevur sambært lóggávuni gjørt ítøkiligar reglur fyri býti av úrsliti, og tær eru fráboðaðar Tryggingareftirlitinum.

Úrslitið fyri 2011 er býtt eftir nevndu meginreglum, sum í høvuðsheitum virka á henda hátt fyri býti av úrslitinum:

- Eginognin og kundaognin hava fingið eitt avkast svarandi til miðal fíggjaravkastið aftaná avdekning umframt 3,5%. Harumframt hevur eginognin fingið tillutað avlopið av samlagstryggingum.

- Restin av avlopinum er flutt til kollektivt bonuspotentiali.

**RAKSTRARROKNSKAPUR**

**Tryggingargjøld**

Tryggingargjøld og innskot verða innroknað í rakstrarroknskapin á skrásettum gjaldkomudegi. Endurtryggjarans partur av tryggingargjøldum verður drigin frá.

**Úrslit av íløguvirksemi**

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevna um ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og útlánum og vinningsbýti av kapitalpørtum.

Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavningar av virðisbrøvum og útlánum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**

Innroknað sum tryggingarveitingar verða goldnar veitingar, endurgoldið frá endurtryggingum, broyting í avsetingum til endurgjøld og broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld.

**Bonus**

Broyting í kollektivum bonuspotentiali er tann partur av tí staðfesta rakstrarúrslitinum eftir rentutilskriving v.m., sum verður tilskrivaður ella skuldskrivaður tryggingarmongdini sum óbýtt avseting. Um parturin av staðfestum úrsliti hjá tryggingarmongdini er negativur, fevnir posturin um nýtslu av kollektivum bonuspotentiali, sum er avsett undanfarin ár.

Broyting í kundaogn fevnir um nettoupphæddina, sum er løgd afturat kundaognini, umframt upphæddina, sum kundaognin er rentað við í árinum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**

Felagið hevur felags fyrisiting við móðurfelagið, og fyrisitingarkostnaðir verða býttir sambært skrivligari avtalu. Hesir kostnaðir fevna um kostnaðir í sambandi við útveganir og fyrisiting av tryggingarmongdini íroknað kostnaðir, ið hava samband við útgjøld av veitingum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**

Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Skattur**

Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður innroknaður á eginognina.

Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum postum.

Møgulig broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, P/F Føroya Lívstrygging og systurfelagið P/F Royndina. Móðurfelagið rindar samanlagda skattin fyri samtakið. Skattaávirkanin av samskattingini verður býtt millum feløgini í samtakinum í mun til skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum.

Í sambandi við skattliga viðgerð av virðisbrøvum nýtir felagið hitt sonevnda lagurprinsippið, sum m.a. hevur við sær, at allir kursmunir – staðfestir og óstaðfestir – verða taldir við í skattskyldugu inntøkuna.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Immateriell ogn**

Ritbúnaður umframt onnur immateriell ogn verður innroknað í fíggjarstøðuna til kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar og samanløgdu niðurskrivingarnar vegna væntað tap. Møguligt tap verður mett við støði í eini niðurskrivingartest.

**Íløguognir**

Fíggjaramboð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlað fíggjaramboð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum.

Sáttmálavirðið á handlaðum, men enn ikki avroknaðum fíggjaramboðum, verður tikið við sum eitt ískoyti ella ein frádráttur til tey tilsvarandi fíggjaramboðini.

Dagsvirðið á børsskrásettum fíggjaramboðum verður ásett samsvarandi endakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni.

**Áogn**

Dagsvirðið á áogn verður ásett við fyriliti fyri væntaðum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, fevna um goldnar útreiðslur, sum viðvíkja næsta roknskaparári umframt tíðaravmarkaðar rentur av fíggjaramboðum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**

Lívstryggingaravsetingar verða mátaðar við at gera upp marknaðarvirðið á væntaðum framtíðar gjaldsstreymum fyri hvørja einstaka trygging. Marknaðarvirðið verður roknað út við at diskontera tær einstøku gjaldingarnar við eini rentu, sum er grundað á eina rentukurvu, sum danska Fíggjareftirlitið hevur almannakunngjørt. Teir mettu framtíðar gjaldsstreymarnir verða útroknaðir við støði í væntaðari livitíð og avlamnisintensiteti grundað á egnar metingar av felagsins tryggingarmongdum.

Lívstryggingaravsetingar innihalda eitt váðaískoyti, sum hevur fyrilit fyri, at tryggingartakarar væntandi liva alsamt longur. Harumframt verður fyrilit tikið fyri sannlíkindum fyri, at tryggingartakarar afturkeypa egnar tryggingar, grundað á greiningar av tryggingarmongdini. Fyri tryggingar, grundaðar á sáttmálar við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, eru hesi sannlíkindi mett til 10%. Fyri aðrar tryggingar eru afturkeypssannlíkindini mett til 100%.

Tryggjaðar veitingar eru marknaðarvirðið á teimum veitingum, sum eru tryggjaðar tí einstaka tryggingartakaranum við einum ískoyti til væntaðan framtíðar kostnað av umsiting og við frádrátti av teimum avtalaðu framtíðar tryggingargjøldunum. Harumframt er íroknað ein mett upphædd til rindan av framtíðar veitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum lýsir skyldur til at veita bonus viðvíkjandi avtalaðum tryggingargjøldum, sum ikki eru fallin til gjaldingar enn.

Bonuspotentiali á frítryggingum fevnir um virðið á skyldum til at veita bonus viðvíkjandi longu inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevna um ikki goldnar, men falnar tryggingarveitingar. Í upphæddini er innroknað ein meting av falnum tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

Kollektivt bonuspotentiali er parturin hjá tryggingarmongdini av staðfestum úrslitum, sum eru avsett kollektivt til tryggingar við rætti til bonus, út yvir lívstryggingaravsetingar og avsetingar til endurgjøld.

Kundaogn er ein partur av grundarfæfeinginum á jøvnum føti við eginognina, men við tíðini gerst kundaognin vanligt bonus hjá teimum einstøku tryggingartakarunum, og sostatt er kundaognin fevnd av tryggingarligu avsetingunum.

**Skuld**

Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virði á aktivum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og tí skattastigi, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaaktiv, harundir skattavirðið á framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Aktuellur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**LYKLATØL**

Tey eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir.

Lyklatølini í "avkastskemanum" (sí notu 21) eru roknað soleiðis, at eitt ársavkast er gjørt upp við støði í vigaðari miðalsaldo av íløgum fyri árið.

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2011<br>DKK | 2010<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Tryggingargjøld brutto | 267.547.112 | 244.837 |
| | Endurtryggingargjøld | -7.231.760 | -6.930 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans** | **260.315.352** | **237.907** |
| | | | |
| | Inntøkur frá assosieraðum virkjum | 21.734 | -11 |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 39.822.069 | 29.554 |
| 3 | Virðisjavningar | 82.891.545 | 19.988 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -2.648.916 | -1.907 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi tilsamans** | **120.086.432** | **47.623** |
| | | | |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -89.498.494 | -97.031 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingum | 935.109 | 2.065 |
| | Broyting í avsetingum til endurgjøld | 2.493.809 | -1.201 |
| | Broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld | 0 | 0 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning tilsamans** | **-86.069.576** | **-96.166** |
| | | | |
| 6 | Broyting í lívstryggingaravsetingum | -243.993.406 | -138.182 |
| | Broyting í endurtryggjaranna parti | -40.839 | -70 |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning tilsamans** | **-244.034.245** | **-138.252** |
| | | | |
| | Bonus tilskrivað í árinum | -4.957.513 | -5.510 |
| 7 | Afturførdar avsetingar viðvíkjandi samlagstryggingum | 0 | 31.488 |
| | Broyting í kollektivum bonuspotentiali | -5.081.736 | -1.721 |
| | Broyting í kundaogn | -5.507.554 | -17.833 |
| | **Bonus tilsamans** | **-15.546.803** | **6.424** |
| | | | |
| 4 | Útveganarkostnaðir | -3.626.975 | -1.111 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaðir | -20.366.668 | -20.358 |
| | Provisjónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum | 3.660.025 | 1.939 |
| | **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning tilsamans** | **-20.333.618** | **-19.530** |
| | | | |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | 6.085.665 | 2.040 |
| | | | |
| | **TRYGGINGARTEKNISKT ÚRSLIT** | **20.503.206** | **40.045** |
| | | | |
| | Íløguúrslit av eginognini | -6.085.665 | -2.040 |
| 8 | Aðrir kostnaðir | -4.531.048 | -2.117 |
| | | | |
| | **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **9.886.494** | **35.888** |
| 9 | Skattur | -1.779.552 | -6.460 |
| | **ÁRSÚRSLIT** | **8.106.942** | **29.429** |

| Nota | | 2011<br>DKK | 2010<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| 10 | Kapitalpartar í assosieraðum virkjum | 5.000.282 | 4.979 |
| | **Íløgur í atknýtt og assosierað virkir tilsamans** | **5.000.282** | **4.979** |
| | Kapitalpartar | 0 | 222.016 |
| | Lánsbrøv | 1.099.874.790 | 631.460 |
| | Íløguprógv | 68.683.434 | 169.897 |
| | Onnur útlán | 19.797.925 | 14.084 |
| | Innlán | 46.643.751 | 15.268 |
| | Avdekningar móti fíggjarligum váðum | 36.158.260 | 16.960 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir tilsamans** | **1.271.158.160** | **1.069.685** |
| | **ÍLØGUOGN TILSAMANS** | **1.276.158.441** | **1.074.664** |
| | Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld | 139.045 | 180 |
| | **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur tils.** | **139.045** | **180** |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 30.360.821 | 11.820 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur tilsamans** | **30.360.821** | **11.820** |
| | Áogn hjá tryggingarfeløgum | 1.395.668 | 1.766 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | 51.403.364 | 13.597 |
| | **ÁOGN TILSAMANS** | **83.298.898** | **27.363** |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 13.244.249 | 7.490 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 24.525 | 18 |
| | **TÍÐARAVMARKINGAR TILSAMANS** | **13.268.774** | **7.508** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.372.726.113** | **1.109.534** |

| Nota | | 2011<br>DKK | 2010<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **SKYLDUR** | | |
| 11 | Partapeningur | 25.000.000 | 25.000 |
| 12 | Trygdargrunnur | 13.178.352 | 13.178 |
| 13 | Burturleggingar sambært viðtøkum | 6.876.760 | 6.877 |
| 14 | Framflutt úrslit | 21.119.711 | 13.013 |
| | **EGINOGN** | **66.174.823** | **58.068** |
| | Tryggjaðar veitingar | 916.812.263 | 414.697 |
| | Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum | 172.690.709 | 327.418 |
| 15 | Bonuspotentiali á frítryggingum | 17.127.642 | 120.522 |
| 16 | **Lívstryggingaravsetingar tilsamans** | **1.106.630.614** | **862.637** |
| | Avsett til endurgjøld | 4.045.426 | 6.441 |
| 17 | Kollektivt bonuspotentiali | 73.499.656 | 68.418 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 39.307.667 | 34.350 |
| 18 | Kundaogn | 68.837.193 | 63.330 |
| | **AVSETINGAR TIL TRYGGINGAR- OG ÍLØGUAVTALUR TILSAMANS** | **1.292.320.556** | **1.035.176** |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging | 1.711.320 | 4.477 |
| | Onnur skuld | 424.098 | 677 |
| 19 | **SKULD TILSAMANS** | **2.135.418** | **5.153** |
| | **TÍÐARAVMARKINGAR** | **12.095.315** | **11.137** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.372.726.113** | **1.109.534** |

20 Eventualskyldur

| t.DKK | Parta-<br>peningur | Trygdar-<br>grunnur | Burtirleggingar<br>sambært<br>viðtøkum | Framflutt<br>úrslit |
|---|---|---|---|---|
| Eginogn 1. januar 2010 | 25.000 | - | - | 3.639 |
| Flutt til trygdargrunnar | | 13.178 | 6.877 | -20.055 |
| Úrslit | - | - | | 29.429 |
| **Eginogn 31. desember 2010** | **25.000** | **13.178** | **6.877** | **13.013** |
| Eginogn 1. januar 2011 | 25.000 | 0 | | 13.013 |
| Úrslit | - | - | | 8.107 |
| **Eginogn 31. desember 2011** | **25.000** | **0** | | **21.120** |

**Solvenskrav og kjarnufæfeingi**

| | **2011**<br>DKK | **2010**<br>t.DKK |
|---|---|---|
| **Grundarfæfeingi og fæfeingiskrav** | | |
| Eginogn | 66.174.823 | 58.068 |
| Kundaogn | 68.837.193 | 63.330 |
| **Kjarnufæfeingi** | 135.012.016 | 121.398 |
| - Immateriell ogn | 0 | 0 |
| - Útsett skattaogn | 0 | 0 |
| **Grundarfæfeingi** | **135.012.016** | **121.398** |
| Fæfeingiskrav | 173.400.000 | 48.094 |
| **Grundarfæfeingi til avlops** | **-38.387.984** | **73.303** |

| | 2011 DKK | 2010 t.DKK |
|---|---|---|
| **Nota 1 • Tryggingargjøld brutto** | | |
| Kapitaltryggingar | 91.518.111 | 103.989 |
| Rentutryggingar | 52.834.520 | 43.299 |
| Ratutryggingar | 44.985.915 | 40.186 |
| **Leypandi tryggingargjøld tilsamans** | **189.338.547** | **187.474** |
| Samlagstryggingar | 77.099.186 | 56.940 |
| Innskot tilsamans | 1.109.379 | 423 |
| **Tryggingargjøld brutto tilsamans** | **267.547.112** | **244.837** |
| | | |
| Tryggingargjøldini kunnu útgreinast soleiðis: | | |
| Individuelt teknaðar tryggingar | 20.774.968 | 20.775 |
| Tryggingar teknaðar í.s.v. starvssetan | 169.672.958 | 167.122 |
| Samlagstryggingar | 77.099.186 | 56.940 |
| **Tilsamans** | **267.547.112** | **244.837** |
| | | |
| Tryggingar við bonusskipan | 267.547.112 | 244.837 |
| Tryggingar uttan bonusskipan | 0 | 0 |
| Unit link-sáttmálar | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **267.547.112** | **244.837** |
| | | |
| Trygingargjøld frá tryggingartakarum búsitiandi í Føroyum | 264.914.378 | |
| Trygingargjøld frá tryggingartakarum búsitiandi í ES-londum | 2.632.734 | |
| Trygingargjøld frá tryggingartakarum búsitiandi í øðrum londum | 0 | |
| **Tilsamans** | **267.547.112** | **244.837** |
| | | |
| Tal av tryggjaðum er: | | |
| Individuelt teknaðar tryggingar | 516 | 1.486 |
| Tryggingar teknaðar í.s.v. starvssetan | 13.424 | 11.957 |
| Samlagstryggingar | 15.120 | 15.042 |

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Nota 2 • Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m.** | | |
| Rentur av virðisbrøvum, útlánum og innlánum | 29.452.914 | 25.106 |
| Vinningsbýti | 10.369.155 | 4.446 |
| Annað | 0 | 2 |
| **Rentur og vinningsbýti v.m. tilsamans** | **39.822.069** | **29.554** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| **Nota 3 • Virðisjavningar** | | |
| Lánsbrøv | 42.401.197 | -1.553 |
| Kapitalpartar | -43.597.886 | 43.140 |
| Íløguprógv | -545.269 | 6.386 |
| Avdekningar móti fíggjarligum váðum | 82.121.959 | -29.153 |
| Valutaterminshandlar | 2.511.544 | 1.168 |
| **Virðisjavningar tilsamans** | **82.891.545** | **19.988** |

**Nota 4 • Fyrisitingarkostnaðir og útveganarkostnaðir umfata:**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Samsýning til aðalfundarvalda grannskoðan: | | |
| Grannskoðan | -355.081 | -353.738 |
| Annað arbeiði enn grannskoðan | -492.834 | -267.212 |
| **Tilsamans** | **-847.915** | **-620.950** |

Allar lønir eru goldnar av móðurfelagnum, og felagið rindar móðurfelagnum umsitingargjald sambært avtalu hesum viðvíkjandi.

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Løn og eftirløn til stjórn | 0 | 0 |
| Nevndarsamsýning | 0 | 0 |
| Miðaltal av starvsfólki | 0 | 0 |

**Nota 5 • Útgoldnar veitingar**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Eftirlønir | -274.078 | -167 |
| Eingangsútgjøld við deyða | -760.458 | -704 |
| Eingangsútgjøld við pensionering | -5.836.431 | -5.734 |
| Avlamisveitingar | -37.725 | -63 |
| Gjaldsundantøka o.a. | -989.749 | -563 |
| Samlagstryggingar | -58.113.057 | -52.106 |
| Afturkeyp | -23.486.995 | -35.828 |
| Kontant útgoldið bonus | 0 | -1.866 |
| **Útgoldnar veitingar tilsamans** | **-89.498.494** | **-97.031** |

**Nota 6 • Broyting í lívstryggingaravsetingum**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Tryggjaðar veitingar | 502.114.943 | 156.819 |
| Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum | -154.727.625 | 23.453 |
| Bonuspotentiali á frítryggingum | -103.393.912 | -42.090 |
| Avsett til bonus og avsláttur v.m. | 0 | 0 |
| **Broyting í lívstryggingaravsetingum** | **243.993.406** | **138.182** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |

**Nota 7 • Afturførdar avsetingar viðvíkjandi samlagstryggingum**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Afturførdar avsetingar vegna broyttar meginreglur | 0 | 31.488 |
| **Aðrar inntøkur tilsamans** | **0** | **31.488** |

**Nota 8 • Aðrir kostnaðir**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Kostnaðir í sambandi við einskiljing | -4.531.048 | -2.117 |

**Nota 9 • Skattur**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Aktuellur skattur | -1.779.552 | -6.460 |
| Útsettur skattur | 0 | 0 |
| **Skattur tilsamans** | **-1.779.552** | **-6.460** |
| | | |
| Úrslit áðrenn skatt | 9.886.494 | 35.888 |
| Munur millum roknskaparligar og skattligar avskrivingar | 0 | 0 |
| Skattlig hall frá undanfarnum árum | 0 | 0 |
| Skattskyldug inntøka | 9.886.494 | 35.888 |
| | | |
| Partafelagsskattur, 18% (fluttur til samskatting við móðurfelagið) | -1.779.552 | -6.460 |
| Broyting í útsettum skatti | 0 | 0 |
| **Skattur tilsamans** | **-1.779.552** | **-6.460** |
| | | |
| Effektivt skattaprosent | 18,0% | 18,0% |

**Útsettur skattur kann lýsast soleiðis:**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Útsettur skattur við ársbyrjan | 0 | 0 |
| Broyting í árinum | 0 | 0 |
| **Útsettur skattur við ársenda** | **0** | **0** |

**Nota 10 • Kapitalpartar í assosieraðum virkjum**

| | Virksemi | Heimstaður | Ognarpartur | Úrslit 2011 | Eginogn 31-12-2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| P/F Lutaíbúðarvirkið | Fastognarfelag | Tórshavn | 50% | 43.468 | 10.000.563 |

**Nota 11 • Partapeningur**

Partapeningur felagsins umfatar 1 partabræv á kr. 25.000.000.

Partapeningurin er ikki býttur upp í flokkar.

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| **Nota 12 • Trygdargrunnur** | | |
| Salda við ársbyrjan | 13.178.352 | 0 |
| Flutt av ársins úrsliti | 0 | 13.178 |
| **Trygdargrunnur við ársenda** | **13.178.352** | **13.178** |
| **Nota 13 • Burturleggingar sambært viðtøkum** | | |
| Salda við ársbyrjan | 6.876.760 | 0 |
| Flutt av ársins úrsliti | 0 | 6.877 |
| **Trygdargrunnur við ársenda** | **6.876.760** | **6.877** |
| **Nota 14 • Framflutt úrslit** | | |
| Salda við ársbyrjan | 13.012.769 | 3.639 |
| Ársins úrslit | 8.106.942 | 29.429 |
| Flutt til trygdargrunn | 0 | -13.178 |
| Flutt til grunn sambært viðtøkum | 0 | -6.877 |
| **Framflutt úrslit við ársenda** | **21.119.711** | **13.013** |
| **Nota 15 • Bonuspotentiali á frítryggingum** | | |
| Uppgjørt bonuspotentiali á frítryggingum | 17.127.642 | 120.522 |
| Lænt av bonuspotentiali í árinum | 0 | 0 |
| Lænt av bonuspotentiali tilsamans | 0 | 0 |
| **Bonuspotentiali á frítryggingum við ársenda** | **17.127.642** | **120.522** |
| **Nota 16 • Lívstryggingaravsetingar** | | |
| Lívstryggingaravsetingar við ársbyrjan | 862.637.208 | 724.455 |
| Akkumulerað virðisjavnan við ársbyrjan | -16.247.872 | -10.840 |
| Retrospektivar avsetingar við ársbyrjan | 846.389.336 | 713.615 |
| Broyting í árinum vegna: | | |
| Tryggingargjøld brutto | 188.994.483 | 188.017 |
| Rentutilskriving | 21.669.273 | 18.272 |
| Tryggingarveitingar | -30.395.688 | -43.125 |
| Kostnaðir eftir tilskriving av umsitingarbonus | -20.789.393 | -18.321 |
| Váðaúrslit eftir tilskriving av váðisbonus | -13.318.583 | -12.068 |
| Retrospektivar avsetingar við ársenda | 992.549.428 | 846.389 |
| Akkumulerað virðisjavnan við ársenda | 114.381.186 | 16.248 |
| **Lívstryggingaravsetingar við ársenda** | **1.106.930.614** | **862.637** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| **Nota 17 • Kollektivt bonuspotentiali** | | |
| Kollektivt bonuspotentiali við ársbyrjan | 68.417.920 | 66.697 |
| Flutt til/frá rakstrarroknskapi | 5.081.736 | 1.721 |
| **Kollektivt bonuspotentiali við ársenda** | **73.499.656** | **68.418** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 18 • Kundaogn** | | |
| Kundaogn við ársbyrjan | 63.329.639 | 45.497 |
| Býtt til kundaogn | 18.021.925 | 18.022 |
| Útgoldið av kundaogn | -21.190.532 | -3.965 |
| Yvirskotspartur hjá kundaogn | 8.676.161 | 3.776 |
| **Kundaogn við ársenda** | **68.837.193** | **63.330** |

**Nota 19 • Skuld**

Øll skuld felagsins fellur til gjaldingar innan 1 ár.

**Nota 20 • Eventualskyldur**

| | | |
|---|---|---|
| Sum trygd fyri skyldum mótvegis tryggingartakarum eru ognir skrásettar við árslok fyri | 1.253.256.000 | 1.064.526 |

## Nota 21 • Úrslit av fíggjarognum

| | Marknaðarvirði | | | | | Úrslit |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Við ársbyrjan | Við ársenda | Netto-íløga | Úrslit í DKK | Miðal íløga | í % áðrenn skatt |
| Grundøki og bygningar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Ognarfeløg | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Grundøki og bygningar tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0,0%** |
| Børsskrásettir føroyskir kapitalpartar | 23.771.843 | 0 | -15.938.250 | -32.526.213 | 11.885.921 | -22,5% |
| Føroyskir kapitalpartar, sum ikki eru børsskrásettir | 4.978.548 | 5.000.281 | 0 | 21.734 | 4.989.414 | 0,6% |
| Børsskrásettir útlendskir kapitalpartar | 191.265.447 | 0 | -162.513.908 | -724.835 | 95.632.724 | -14,6% |
| **Aðrir kapitalpartar tilsamans** | **220.015.837** | **5.000.281** | **-178.452.158** | **-33.229.314** | **112.508.059** | **-29,9%** |
| Statslánsbørv (Øki A) | 242.141.795 | 384.682.162 | 137.563.020 | 30.811.771 | 313.411.979 | 13,0% |
| Realkredittlánsbrøv | 470.677.558 | 756.977.199 | 242.917.943 | 39.808.085 | 613.827.379 | 8,8% |
| Kreditlánsbrøv investment grade | 45.153.429 | 6.757.193 | -35.446.864 | 210.867 | 25.955.311 | 0,6% |
| Kreditlánsb. non inv. grade og emerging markets | 43.383.767 | 20.141.400 | -19.655.063 | -349.419 | 31.762.584 | -0,7% |
| **Lánsbrøv í alt** | **801.356.549** | **1.168.557.954** | **325.379.036** | **70.481.304** | **984.957.252** | **8,2%** |
| **Aðrar fíggjarognir** | **28.886.401** | **66.441.676** | | **-521.925** | **47.664.039** | **-1,1%** |
| Avleidd fíggjaramboð | 16.960.017 | 36.158.259 | | | | |

## Nota 22 • Býti av partabrøvum á vinnugreinar og økir

| | Føroyar | Restin av Evropa | Norður-amerika | Suður-amerika | Japan | Restin av Fjareystri | Onnur lond | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0,0% | 0,0% | 10,9% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 10,9% |
| Tilfar | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| Ídnaður | 0,0% | 8,3% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 8,3% |
| Nýtsluvøra | 0,0% | 8,6% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 8,6% |
| Konsumentvøra | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| Sunnleikarøkt | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| Fígging | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 17,4% | 0% | 17,4% |
| KT | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| Fjarskifti | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| Veiting | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| Ikki útgreinað | 54,7% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 54,7% |
| **Tilsamans** | **54,7%** | **17,0%** | **10,9%** | **0,0%** | **0,0%** | **17,4%** | **0,0%** | **100,0%** |

**Nota 23 • Váðaskema pr. 31. desember 2011**

| (Upphæddir í t.DKK) Hending | Mesta ávirkan á grundar-fæfeingi | Mesta ávirkan á kollektivt bonuspoten-tiali | Mesta ávirkan á bonuspo-tentiali av frí-tryggingum áðr. broyting í nýttum bonuspotentali av frítryggingum | Mesta ávirkan á nýtt bonuspo-bonuspoteniali av frítryggingum |
|---|---|---|---|---|
| Rentuvøkstur á 0,7 prosentstig | -139 | -577 | 128.788 | 0 |
| Rentufall á 0,7 prosentstig | 16.084 | 66.615 | -14.558 | 0 |
| Partabrævafall á 12 % | -4.288 | -17.758 | 0 | 0 |
| Fall í føstum ognum á 8 % | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Valutaváði (VaR 99,5%) | -204 | -846 | 0 | 0 |
| Tap uppá mótpartar 8 % | -31 | -129 | 0 | 0 |
| Fall í deyðiligheitsintensiteti á 10 % | 0 | -23.650 | -839 | 0 |
| Vøkstur í deyðiligheitsintensiteti á 10 % | 0 | 60 | 1.092 | 0 |
| Vøkstur í avlamnisintensiteti á 10 % | 0 | -11.000 | -2.477 | 0 |

Útrokningarnar eru gjørdar samsvarandi fylgiskjali 15 í Kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir.

Úrokningarnar eru gjørdar við teirri fortreyt, at hendingarnar fara fram her og nú, har ávirkanin er roknað út sum ein beinleiðis ávirkan við støði í javnanum við árslok.

**Nota 24 • Nærstandandi partar**

| | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| **Avgerandi ávirkan:** | |
| Føroya Landsstýri, Tórshavn | Høvuðspartaeigari |
| P/F Føroya Lívstrygging | Høvuðspartaeigari (móðurfelag) |

**Transaktiónir við nærstandandi partar:**
Felagið og móðurfelagið hava felags umsiting, KT og hølir v.m., og kostnaðurin av hesum verður býttur millum feløgini í mun til nýtsluna av hesum. Í árinum eru goldnar 24 mió. kr. til móðurfelagið fyri umsiting v.m.
Felagið hevur selt børsskrásett partabrøv til móðurfelagið fyri 11,6 mió. kr. svarandi til marknaðarvirðið á partabrøvunum.

**Nota 25 • Ognarviðurskifti**
Fylgjandi partaeigarar eru upptiknir í felagsins partaeigarayvirlit við einum ognarparti, ið er omanfyri 5%:

· P/F Føroya Lívstrygging, Tórshavn

**Nota 26 • Nevnd, stjórn og leiðandi starvsfólk**

Nevndar- og stjórnarlimir felagsins eru stjórar og/ella nevndarlimir í fylgjandi føroysku partafeløgum:

| | Leiðslustørv |
|---|---|

*Nýttar styttingar:*
(NF)= Nevndarformaður
(NL)= Nevndarlimur
(S) = Stjóri

| | |
|---|---|
| **Nevnd** | |
| Finn Danberg, nevndarformaður | P/F Føroya Lívstrygging (NF), P/F Royndin (NF)<br>P/F Tryggingarfelagið Lív (NF), P/F Lutaíbúðarvirkið (NL)<br>P/F Fastogn (NL), P/F Barið (NL), P/F Sendistovan (NL)<br>P/F Prentsmiðjan (NL), P/F 2 (S+NL), Sp/F Danberg (S) |
| Gunnleyg Árnafjall | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL)<br>P/F Tryggingarfelagið Lív (NL), P/F Lutaíbúðarvirkið (NL) |
| Kári Petersen | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL)<br>P/F Tryggingarfelagið Lív (NL), P/F Lutaíbúðarvirkið (NL) |
| Jógvan Mørkøre | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL)<br>P/F Tryggingarfelagið Lív (NL), P/F Lutaíbúðarvirkið (NL) |
| Gunnleivur Dalsgarð | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL)<br>P/F Tryggingarfelagið Lív (NL), P/F Lutaíbúðarvirkið (NF) |
| **Stjórn** | |
| Poul Christoffer Thomassen | Sp/f Aktuarurin (S) |

**Høvuðstøl (t.DKK)**

| | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 260.315 | 237.907 | 227.511 | - | - |
| Útgoldnar veitingar | -86.070 | -96.166 | -61.415 | - | - |
| Úrslit av íløguvirksemi | 120.086 | 47.623 | 64.488 | - | - |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -23.994 | -21.469 | -18.134 | - | - |
| Úrslit av endurtrygging | -2.677 | -2.995 | -2.601 | - | - |
| Tryggingartekniskt úrslit | 20.503 | 40.045 | 6.605 | - | - |
| Ársúrslit | 8.107 | 29.429 | 3.639 | - | - |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 1.292.321 | 1.035.176 | 902.217 | - | - |
| Eginogn tilsamans | 66.175 | 58.068 | 28.639 | - | - |
| Aktiv tilsamans | 1.372.726 | 1.109.534 | 952.882 | - | - |
| Depotrenta | 2,5% / 1,5% | 3,5% | 2,5% | - | - |

**Lyklatøl**

| | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lykatøl fyri fíggjarvirksemi** | | | | | |
| Avkast áðrenn avdekning | 3,2% | 6,9% | 10,9% | - | - |
| Avkast eftir avdekning | 10,2% | 4,8% | 8,4% | - | - |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váða** | | | | | |
| Kostnaðir í prosent av tryggingargjøldum | 9,0% | 8,8% | 7,7% | - | - |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 2,6% | 2,8% | 1,2% | - | - |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 1.579 kr. | 1.449 kr. | 1.098 kr. | - | - |
| Kostnaðarúrslit | -4,9% | -5,1% | 0,2% | - | - |
| Váðaúrslit | -1,3% | -1,5% | 1,9% | - | - |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Bonusstig | 7,4% | 8,1% | 9,3% | - | - |
| Kundaognarstig | 6,9% | 7,5% | 6,4% | - | - |
| Eigarakapitalstig | 6,7% | 6,9% | 4,0% | - | - |
| Yvirdekningsstig | -3,9% | 8,7% | 4,4% | - | - |
| Fæfeingisdekningur | 77,9% | 252,4% | 173,0% | - | - |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | 15,9% | 82,8% | 11,3% | - | - |
| Renting av eginogn eftir skatt | 13,1% | 67,9% | 9,3% | - | - |
| Renting av kundamiðlum eftir kostnaðir áðrenn skatt | 8,6% | -0,5% | 1,8% | - | - |
| Renting av kundaogn áðrenn skatt | 14,1% | 8,7% | 12,0% | - | - |

Har tað ikki er møguligt vegna væntandi datagrundarlag at geva upplýsingar, er hetta merkt sum "I/M".